

*Mynd: Finnur Justinussen*

# Friðarligt nýggjárshald

NÝTT ÁR
*Ingrid Bjarnastein*

Nýggja árið er nú byrjað, og føroyingar hava tikið friðarliga ímóti ár 2003. Frá politistøðunum kring landið verður sagt, at friðarligt hevur verið.

Í Havn vóru nógv fólk í býnum, onkur vil enntá vera við, at tað var sum á ólavsøku. Politiið sigur tó, at tað hevur verið ógvuliga friðarligt eftir umstøðunum. Nógv er at vera úti til, men fólk hava sum heild skikka sær væl. Eini fimm hava sovið ársins fyrstu nátt í brummuni.

Politiið hevur annars ikki havt stórvegis trupulleikar av rakettum og øðrum, sum viðhvørt undanfarin ár.

Henda myndin varð annars tikin nýggjársaftan á midnátt á Hamrinum á Argjum.

## Gjørt seg inn á 87 ára gamla konu

**Politiið viðgerð í løtuni eitt mál, sum snýr seg um eina 87 ára gamla konu. Onkur hevur gjørt seg inn á konuna, sum er djúpt dement og óhjálpin. Politiið viðgerð málið, sum eitt neyðtøkumál**

NEYÐTØKUMÁL
*Ingrid Bjarnastein*

Politiið fekk mánadagin 30. des. fráboðan um, at onkur hevði gjørt seg inn á eina 87 ára gamla kvinnu. Kvinnan, sum er djúpt dement, er óhjálpin, býr einsamøll, men avvarðandi búgva nærhendis.

Onkur hevði sunnudagin verið inni hjá konuni, og gjørt seg inn á hana. Politiið vil ikki siga, at talan er um neyðtøku, men klæðini á konuni vórðu knappað upp, tá komið var fram á hana.

Politiið veit ikki, hvør tað er, sum hevur framt ógerðina, men sagt verður, at hetta málið verður tikið ógvuliga álvarsamt.

– Í løtuni er onki, sum bendir á, at talan er um eina neyðtøku. Men viðkomandi er óhjálpin og fær ikki gjørt nakað. Vit vita ikki nágreiniliga, hvat er hent, men hetta verður alt kannað, sigur politiið.

Kvinnan hevur verið til neyðugu kanningarnar, og arbeitt verður í størsta álvara víðari við málinum.

## Nógvir rúsdrekkakoyrarar

**Politiið í Runavík hevur upp á eina viku tikið fýra rúsdrekkakoyrarar**

PARAGRAFF 13
*Ingrid Bjarnastein*

Sjálvt um nýggjárið hevur verið friðarligt í Eysturoynni, so hevur politiið í Runavík tikið heili fýra rúsdrekkakoyrarar. Hetta er ógvuliga nógv, verður sagt av politistøðini í Runavík.

Ein harðskapssak verður í løtuni viðgjørd á Skálafjørðinum. Talan er um tveir vinmenn, sum fóru til hendurs, og annar teirra varð sparkaður í høvdið. Politiið í Runavík sigur, at sparkaði maðurin breyt kinnbeinið í tveimum støðum, og var lagdur inn á Landssjúkrahúsið.

30. og 31. desember og 1. januar hevur politiið í Klaksvík annars gjørt paragraff 13 kanningar í býnum. Tilsamans vóru átta bøtur skrivaðar. Tær vórðu skrivaðar millum annað fyri tokuljós, lyktafeilir, vantandi koyrikort, trygdarbeltið og annað.

Annars letur politiið í Klaksvík væl at nýggjárshaldinum har norðuri. Politiið varð einaferð boðsent at koma norður um Klaksvíkina eftir einum fullum manni, sum var óður í høvdinum, og var til stóran ampa. Við eldi og rakettum hevur politiið í Klaksvík ikki havt nakrar trupulleikar.

## Eldur í bilhúsi

ELDSBRUNI
*Ingrid Bjarnastein*

Nýggjársmorgun fekk politiið í Havn fráboðan um ein eldsbruna í einum bilhúsum úti í Svanga. Eldurin er helst kyknaður av eini sigarett ella einum kertuljósi, verður upplýst av politistøðini í Havn. Skjótt gekk at sløkkja og hvørki fólkaskaði ella stórur skaði annars stóðst burturúr eldsbrunanum.

## Eldur í sethúsum

Eldsbruni
*Ingrid Bjarnastein*

Um vikuskiftið kom eldur í eini sethús á Strondum. Politiið í Runavík sigur, at eldurin er helst kyknaður av livandi ljósum, sum brunnu niður í eina træplátu. Fólkini í húsunum vóru til jólahald á skúlanum, so ongin fólkaskaði stóðst úr hendingini.

Eldurin breyt ikki ígjøgnum, so tíbetur brunnu húsini ikki í grund, men roykskaðin var kortini stórur. Sløkkiliðini á Skála og Strondum vóru skjót á staðnum, og tað gekk væl at sløkkja.



# Varpið í leygardagsblaðnum

SKRÁIR
*Eirikur Lindenskov*

Útvarps- og sjónvarpsblaðið hjá Sosialinum, Varpið, verður hesa vikuna at fáa í leygardagsblaðnum.

Av tí at skotbráið at fáa allar skáirnar í hús er heldur knapt, bar ikki til at gera blaðið klárt fyri nýggjárshalguna. Men leygardagsblaðið er at fáa fríggjadagin seinnapart, og blaðið verður borið so at siga øllum haldarum blaðsins fríggjakvøldið við útberingini hjá Prentmiðstøðini. Men fyri at eingin skal verða við sviðusoð, eru allar skráirnar fyri fríggjadagin eisini prentaðar í fríggjadags Sosialinum – hesum blaðnum, tygum nú sita við í hondini., sum verður á gøtuni seinnapartin í dag.

Forsíðuna á Varpinum hesaferð myndar gitna songkvinnan, Britney Spears, sum leygardagin verður at síggja í livekonsert úr Las Vegas. Britney Spears hevur rættuliga havt eydnuna við sær, tí tað eru ikki mangar 19 ára gamlar kvinnur – ella gentur – ið hava megnað at selt næstan 40 milliónir fløgur og sum hava verið á ótalligum konsertferðum kring heimin allan.

Í Las Vegas duga tey væl at gera burturúr, og eingin ivi er um, at talan verður um tað heilt stjóra showið – henda ársins fyrsta konsertin hjá Britney Spears.




*VARPIÐ fyri komandi vikuna verður at fáa saman við leygardagsblaðnum*

## Ársins fyrsti føroyingur



FØÐING
*Ingrid Bjarnastein*

Klokkan 03.16 nýggjársmorgun kom sá fyrsti føroyingur í nýggjár árinum dagsins ljós fyri allarfyrstu ferð. Og tað varð ein vælskaptur drongur.

Stoltu foreldrini eru Mary og Palli Marsten úr Klaksvík. Fyrsta barnið í árinum vigaði annars 3650 gr og var 53 sentimetrar.

Fyrsti føroyingurin í ár hevur eisini eina systir og ein beiggja. Sagt verður úr Klaksvík, at stóribeiggin var ógvuliga glaður fyri beiggjan. Hann hevði væntað, at tað var ein genta, og gjørdist tí sjálvandi ovurfegin tá hann frætti, at hann hevði fingið ein lítlabeiggja, tí tað var tað, sum hann ynskti sær mest.

Foreldrum og systkjum verður ynskt hjartaliga tillukku við nýggja familjuliminum.

Sosialurin
Lesið Sosialin – tað loysir seg

